## Hvussu tryggur er bilur tín?

**Tíðindaskriv**
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Í álitinum um Nullhugsjónina stendur: Kap 30.1 EuroNCAP

Miðskeiðis í 90-árunum tóku fremstu bileigarafelagsskapir í Evropa seg saman og fóru undir verkætlanina »European New Car Assessment Programme«, stytt EuroNCAP.

Í fyrsta umfari varð biðið um samstarv við svensku og bretsku ríkisstjórnirnar.

Endamálið við verkætlanini var at fáa bilaframleiðarar at betra um trygdina á bilum við m.a. at gera samanstoytsroyndir við øllum nýggjum bilum, so hvørt teir komu fram, og geva teimum eina virðismeting ella »stjørnurating«, sum tað verður rópt, alt eftir, hvussu væl teir stóðu seg í royndunum.

Ikki so óvæntað, vóru bilaframleiðararnir ikki ovurfegnir um hetta stigið. Men, hvussu var og ikki, so hava teir tó allir roynt at gera bilarnar so tryggar, at teir stóðu royndirnar sum best.

Í fyrstuni var vanligt, at bilar fingu tvær stjørnur, men nú er eingin bilaframleiðari nøgdur, fyrr enn nýggi bilurin fær 4 stjørnur.

EuroNCAP roynir nú at hækka støðið enn meira og arbeiðir við einum »5-stjørnuprísi«.

Kanningar prógva, at EuroNCAP longur hevur bjargað mannalívum í túsunda tali.

# Tórbjørn spyr um politisk fiskiloyvi

**Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, vil hava løgmann at svara uppá, hvussu tað ber til, at fiskiloyvi skulu fyri á politiskum landsstýrisfundi, áðrenn tey verða latin brúkarunum. Løgtingsmaðurin heldur ikki, at hetta er í tráð við andan í stýrisskipanarlógini. Løgmaður sigur, at talan er um kunning og ikki um at útflýggja nøkur loyvi**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, vil hava løgmann at siga sær, hví fiskiloyvi skulu fyri á politiskum landsstýrisfundi…*

*Mynd: Jan Müller*

Fiskiloyvi skulu fyri á politiskum landsstýrisfundi, áðrenn tey verða latin til brúks. Tað stendur í áseting hjá løgmanni, sum sæst á heimasíðuni hjá landsstýrinum.

Hetta er beint í móti andanum í stýrisskipanarlógini, sum er, at gangast skal burtur frá kollektivum avgerðum, og at málini skulu leggjast út til hvønn landsstýrismann og aðalstýri sær at avgreiða, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, sum vil hava løgmann at svara sær uppá, hvussu hetta skal skiljast, og hví hendan ásetingin er komin.

Tórbjørn Jacobsen hevur sett Jóannesi Eidesgaard spurningin munliga, og løgmaður skuldi svara í tinginum seinnapartin mikudagin.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at hetta er at taka málsviðgerð frá umsitingini, og kann leiða til tann tanka, at nú skal politiski myndugleikin gera av, hvør skal sleppa at fiska undir Føroyum. Tá er eisini skjótt til tann ræðandi tanka, at tað ræður um at hava rættan politiskan lit fyri at sleppa á flot.

– Vit minnast øll jammurin, sum varð av Jógvan S málinum har meira enn einaferð varð lagt upp til, at tað fiskiloyvið varð givið av politiskum grundum, sigur Tórbjørn Jacobsen. Tá sat Folkaflokkurin á fiskivinnumálunum. Í dag er tað Sambandsflokkurin, sum umsitir hesi mál, men Fólkaflokkurin er framvegis í samgonguni. Eg spæli mær við tankan, hóast tað ikki kann prógvast, at møguleiki er fyri, at Fólkaflokkurin eisini stendur aftan fyri hesa ásetingina um at fáa fiskiloyvini á landsstýrisborð, soleiðis at teir kunnu gera sína ávirkan galdandi har. Tað kann vera, at hetta er ein treyt fyri at skipa samgongu? Hvør veit? spyr løgtingsmaðurin.

Tórbjørn Jacobsen vil eisini hava at vita frá løgmanni, hvussu hendan viðgerð skal fara fram. Hvør skal ábyrgdast, um ikki alt fer rætt fram? spyr hann.

Hava teir brent seg so illa av Jógvani S, at teir vilja gardera seg við at gera avgreiðsluna kollektiva, so eingin veit, hvørjum farast skal eftir, um okkurt óregluligt fer fram?

– Tað eru ógvuliga nógvir spurnignar í hesum málinum, sum eg haldi vera rættiliga prinsipiellar og fegin vil hava svaraðar, sigur tjoðveldistingmaðurin.

Tað er ikki tí, at hann hevur hoyrt um nakað ávíst fiskiloyvi, sum latið er, síðan hendan ásetingin varð gjørd, sigur Tórbjørn Jacobsen. Men prinsippið í hesum metir hann kunna undirgrava stýrisskipanarlógina, sum júst ásetur tað øvugta. Nevniliga at leggja avgreiðsluna út á avvarðandi umsiting.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur við Sosalin, at her má okkurt vera misskilt, um løgtingsmaðurin heldur, at hendan ásetingin merkir, at fiskiloyvini skulu adresserast á landsstýrisfundi. Tí tað er ikki ætlanin við ásetingini.

– Tað, sum hetta snýr seg um, er at landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum kunnar landsstýrið um tey loyvi, ætlanin er at geva, sigur løgmaður. Á sama hátt, sum hildið varð, at tað var rætt at boða landsstýrinum frá, hvørjar nevndir og ráð, ið setast skuldu, heldur løgmaður, at tað er rætt at landsstýrið fær at vita, hvørji fiskiloyvi eru ávegis, sigur løgmaður, sum metir fiskiloyvini at vera rættiliga prinsipiell.

Spurdur, um tað eru fingramerkini hjá Fólkaflokkinum, sum enn standa á fiskiloyvunum, soleiðis sum Tórbjørn Jacobsen ímyndar sær, svarar Jóannes Eidesgaard, at tað er tað avgjørt ikki.

– Hetta havi eg sum løgmaður einsamallur ásett, sigur hann.



*Løgmaður sigur, at talan er um kunning og ikki um at taka nakrar avgerðir*



»Ábyrgdarfull skeinking«:

# Tá nokk er nokk

**Noreg og Svøríki kunnu vísa á sera góð úrslit við arbeiðnum at fyribyrgja harðskap og óskil á skeinkistøðum. Men í Føroyum eru ongar ítøkiligar ætlanir um at gera nakað líknandi**

RÚSEVNA-RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Hvørki ein herd rúsdrekkalóg, moralprædikur ella lyftir peikifingrar fáa syrgiligu avleiðingarnar av misnýtslu at hvørva, segði Hans Pauli Strøm millum annað, tá hann setti 20. norðurlendsku rúsevnaráðstevnuna í Norðurlandahúsinum.*

Týsdagin endaði 20. norðurlendska rúsevnaráðstevnan í Norðurlandahúsinum, sum fyribyrgingarráðið í Føroyum hevur verið vertur fyri. Kjakast hevur verið um flest øll evni innan trupulleikar og fyribyrging av ovurnýtslu, men tað var týðiligt, at tað er stórur munur á, hvussu langt tey ymsu londini eru komin við arbeiðinum. Og tað er neyvan ov nógv sagt, at føroyingar hava rættiliga nógv eftir at læra, ikki minst tá tað ræður um at skapa trygg skeinkiumhvørvi og at royna at ávirka hugburðin til nýtslu av rúsdrekka.

Men, sum Hans Pauli Strøm, heilsumálaráðharri segði, tá hann setti stevnuna, so er ovurnýtsla av rúsdrekka ein av óhepnu eyðkennunum við vælferðarsamfelagnum, sum ikki fer burtur av sær sjálvum. Tí er tað umráðandi, at vit ikki bara yppa øksl og lata standa til, men royna at læra av royndunum hjá hvørjum øðrum. Sjálvur trýr Hans Pauli ikki uppá ræðumyndir og lyftar peikifingrar, men heldur uppá eitt samstarv, har nýggj vitan og upplýsing eru hornasteinarnir. Tað er har, tað fyribyrgjandi arbeiðið skal seta sítt álit, og ikki á hvørki politiska ella fólksliga undirtøku fyri at rúsdrekkalógin skal herðast, segði Hans Pauli.

### »Ábyrgdarfull skeinking«

Eitt av høvuðsevnunum á ráðstevnuni var fyribyrging av harðskapi og óskili í sambandi við skeinking. Føroyar, Svøríki og Noreg stóðu fyri hesum partinum av ráðstevnini undir heitinum »Ábyrgdarfull skeinking«, eitt heiti, sum var tikið frá eini norskari verkætlan, sum byrjaði í smáum í Kristiansand í 1997, og sum nú fevnir um stórar partar av Noreg. Í Svøríki hava tey havt eina líkandi verkætlan í fleiri ár, og í báðum londum er talan um eina varandi skipan og also ikki einstøk átøk.

Hornasteinurin í skipanini er, at hon er eitt samstarv millum heilsumálaráð, býráð, politi, ferðavinnu og skeinkistøð. Endamálið er í stuttum at gera fólk tilvitaði um ta ítøkiligu ábyrgd, sum skeinkistøð hava fyri at bæði starvsfólk og gestir kunnu kenna seg so trygg, sum møguligt, á matstovuni ella vertshúsinum.

### Góða stemningin í fokus

Marianne Virtanen greiddi frá norska átakinum, har fyrsta stigið er at øll starvsfólkini á skeinkistaðnum, líka frá duravørðum til ovastu leiðslu fáa upplæring í at handfara rúsaðar persónar og óhepnar støður, sum kunnu gerast vandamiklar. Á ráðstevnuni fingu luttakarnir høvi at síggja bæði faldarar og videobrot, sum vóru partar av frálærutilfarinum. Felags fyri tilfarið er ein rættiliga frísk og øðrvísi tilgongd til evnið, sum allatíðina setur góða stemningin í fokus. Í einum av faldarnum verður til dømis sagt, at á teimum serligu »Skori-barrunum«, har fólk serliga koma fyri at hyggja sær eftir eini damu ella sjeiki, er sjálvandi altavgerandi at ein, sum ikki fær meir at drekka, ikki verður eyðmýktur ella gjørdur til láturs. Har verður álagt starvsfólkunum at brúka skemt og humor og annars royna at syrgja fyri, at onnur ikki varnast, hvat gongur fyri seg. Reyði tráðurin í átakinum er at sleppa undan moralprædikum og ræðumyndum, og politiið vísir seg bara á staðnum til eitt hugnaligt prát við starvsfólki, tá lítið er at gera – og so annars bara, tá tað verður boðsent.

### Góð reklama

Fyribils vísa úrslitini, at talið á harðskapsfráboðanum frá skeinkistøðum er minkað við 28% í miðal fyri tey einstøku skeinkistøðini, og í løtuni verður arbeitt við at fáa størri partar av landinum við í skipanina, bæði í Svøríki og Noreg.

Spurdur um, hvat skeinkistøðini halda um átakið, sigur sviin Mikael Bentzer, at tað ongin ivi er um, at tey fata tað sum ein stóran fyrimun í hørðu kappingini millum skeinkistøð, at fólk vita, hvørjar matstovur ella vertshús eru við í átakinum.

– Fólk tíma ikki at fara út at fáa sær eina øl ella at eta á einum stað, har lítið og onki verður gjørt fyri at sleppa undan ov fullum og órógvandi gestum. Tí er tað avgjørt eitt pluss fyri staðið, at hava glasundirløg og annað við áskriftini »Ansvarligt vertsskap« og »Nokk er nokk« liggjandi frammi. Slíkt er eftirhondini ein av bestu reklamunum hjá matstovum og vertshúsum í Stockholm, sigur Mikael Bentzer.

### Føroyar – ongar ítøkiligar ætlaninr

Jenny Lydersen frá skeinkiloyvisnevndini umboðaði Føroyar í hesum partinum á ráðstevnuni, og greiddi hon frá, hvussu nevndin arbeiðir, og hvørjar lógir og reglur hon hevur at ganga eftir. Onki skipað eftirlit er við, um lógin verður hildin, og sum er, ger hvørki løgreglan ella loyvisnevndin nakað fyrr enn ein fráboðan um brot á lógina fyriliggur. Sambært Jenny Lydersen, sum eisini er limur í fyribyrgingarráðnum, hevur trupulleikin verið uppi og vent í ráðnum, men enn eru ongar ítøkiligar ætlanir á borðinum, sum líkjast teimum norsku og svensku.



*Tað er mest sum vorðið eitt góðskumerki fyri matstovur og vertshús í Stockholm at vera við í átøkum fyri ábyrgdarfullari skeinking, segði sviin, Mikael Bentzer*



*Fráboðanirnar um harðskap eru minkaðar við 28% í miðal á norskum skeinkistøðum, eftir at átakið »Ábyrgdarfull skeinking« varð sett í verk í 1997, greiddi Marianne Virtanen úr Noreg frá*



*Loyvisnevndin ger onki, fyrr enn ein politifráboðan um brot á lógina fyriliggur. Og sum er, hevur fyribyrgingarráðið ongar ítøkiligar ætlanir, sum líkjast átakinum »Ábyrgdarfull skeinking«, sigur Jenny Lydersen, limur í skeinkiloyvisnevndini og fyribyrgingarráðnum.*

## Steðga »rákoyringini«

**Tíðindaskriv**
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Norðmenn ganga nýggjar leiðir í royndini at bøta um ferðslutrygdina. Teir eru farnir at nýta motorsport at fyribyrgja vanlukkum.

Fyri at steðga »rákoyringini« á landsvegunum, vilja teir gera eina roynd, at fáa hesar bilførarnar inn á øki, ið eru ætlað til hetta endamálið. Hesar miðstøðirnar skulu rekast privat, men kommunurnar ætla eisini at gjalda ein part av rakstrinum treytað av, at tað kann skjalprógvast, um átakið bøtir um ferðslusiðin hjá limunum.

## Lóg um handilstiltøk mótvegis Somaliu

**Tíðindaskriv**
*Løgmansskrivstovan*

Á landsstýrisfundi týsdagin tann 31. august vóru m.a. hesi evni fyri:

- Uppskot til løgtingslóg um handilstiltøk mótvegis Somaliu (løgmaður)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg (landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum)
- Upprit um at seta á stovn ein dagstovn til børn við serligum atferðar- og tilknýtingartrupulleikum (landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum)
- Upprit um at broyta kommunuvallógina (landsstýrismaðurin í innlendismálum)
- Upprit um felags endurskoðan av gymnasialu miðnámsútbúgvingunum (landsstýrismaðurin í mentamálum)
- Uppskot til kunngerð um veiðidagbøkur fyri føroysk fiskifør (landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum)

Upplýsingar um omanfyrinevndu mál kunnu fáast frá løgmanni ella avvarðandi landsstýrismanni.